## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi. Turt, burtursæð frá onkrum kavaælið. Hitin fellur niður móti frostmarkinum.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av eystri og landsynningi. Skýggjað og at byrja við okkurt kavaælið. Hitin um frostmarkið, men út á dagin nakað lýggjari.




**Veðrið sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi. Skýggjað og regn í skiftum. Hitin millum 2 og 5 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Hvassur vindur av landsynningi. Skýggjað og regn fyri tað mesta. Hitin økist til millum 4 og 8 stig.

# »Eg eri so spent til jóla…«



*Jólahúsið, sum Hjørleif Poulsen hevur smíðjað flokki sínum. Her er tað 7 ára gamla Brynja, sum fiskar eina gávu upp gjøgnum skorsteinin*

*Mynd: Rúna Sivertsen*

**Børnini í 1.a á Ziskatrøð í Klaksvík eru heppin, tí flokslærarin hjá teimum, Hjørleif Poulsen, hevur smíðjað teimum eitt jólahús**

JÓLAHUGNI
*Rúna Sivertsen*

Hvønn skúladag í desember hava børnini í 1.a í skúlanum á Ziskatrøð, fiskað gávur úr húsinum, sum flokslærari teirra hevur gjørt teimum. Men summi máttu hava størri tol enn onnur, tí ikki øll sluppu at fiska beinanveg.

Gávurnar hava børnini sjálvi keypt, og lærarin hevur bundið snór á til teirra at hála pakkarnar upp við.

Jólahúsið er snøgt og sera hugnaligt við vindeygum og rútum úr glasi. Út millum gardinurnar, sum eru úr pappírsserviettum skínir ljósið og setir ein rættiligan jóladám á floksrúmið.

Nú er skúlagongdin fyri árið 2002 liðug, og húsið er vorðið tómt fyri gávur. Børnini hava fingið jólafrí og ótolnast nú rættiliga til jólaaftan.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷11 |
| Nuuk | ÷2 |
| Qaqortoq | 1 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | ÷3 |
| Halifax | ÷1 |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 6 |
| London | 6 |
| Tromsø | ÷2 |
| Bergen | 1 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | ÷2 |
| Keypmannah. | 4 |
| Helsinki | ÷3 |
| Moskva | ÷12 |
| Berlin | 0 |
| Warzawa | ÷1 |
| Kiev | ÷8 |
| Bukarest | 0 |
| Paris | 4 |
| Madrid | 13 |
| Róm | – |
| Malorca | 20 |
| Athen | 10 |
| Malta | 18 |
| Tunis | 21 |
| Beijing | ÷1 |
| New Dehli | 22 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | – |
| New York | 2 |
| Miami | 21 |
| Los Angeles | 13 |
| Meksikobýur | 18 |
| Panama | 30 |
| La Paz | 10 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 25 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt hátrýst yvir Bretsku oyggjunum fer í ein landsynning, og eitt lágtrýst í Grønlandsfjørðin fer norður um Ísland til Norður-Noregs




Seinni tekur eitt nýtt lágtrýst seg upp í Grønlandsfjørðinum og brúgvaløg haðani koma inn yvir Føroyar sunnudagin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 18/12 kl. 06⁰⁰– 19/12 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,8°
Minsti hiti máldur í des.: ÷10,5° Mesti hiti máldur í des.: 13,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 3,0 mm – mált frá 18/12 kl. 06⁰⁰– 19/12 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í desember: 55,5 mm


TURRIKLÆÐI
HÚGVUR
T-SHIRT
KEPPAR
og FLØGG



12. MAÐUR
www.footballsupporters.fo

BILLUTIR
ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666


## VESTFALLSKYRRINDI

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 20. des. | 06.48 | 19.12 | 05.48 | 18.12 | 06.03 | 18.27 | 08.48 | 21.12 | 09.48 | 22.12 | 05.03 | 17.27 | 04.03 | 16.27 | 07.03 | 19.27 | 08.03 | 20.27 | 06.33 | 18.57 | 07.48 | 20.12 |
| 21. des. | 07.37 | 20.02 | 06.37 | 19.02 | 06.52 | 19.17 | 09.37 | 22.02 | 10.37 | 23.02 | 05.52 | 18.17 | 04.52 | 17.17 | 07.52 | 20.17 | 08.52 | 21.17 | 07.22 | 19.47 | 08.37 | 21.02 |
| 22. des. | 08.28 | 20.53 | 07.28 | 19.53 | 07.43 | 20.08 | 10.28 | 22.53 | 11.28 | 23.53 | 06.43 | 19.08 | 05.43 | 18.08 | 08.43 | 21.08 | 09.43 | 22.08 | 08.13 | 20.38 | 09.28 | 21.53 |
| 23. des. | 09.18 | 21.41 | 08.18 | 20.41 | 08.33 | 20.56 | 11.18 | 23.41 | — | 12.18 | 07.33 | 19.56 | 06.33 | 18.56 | 09.33 | 21.56 | 10.33 | 22.56 | 09.03 | 21.26 | 10.18 | 22.41 |

14. des.: Mánin longst frá jørðini
19. des.: Fullmáni
27. des.: Seinna kvarter
30. des.: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2002

5 707265 100050 >